VÁGA KOMMUNA

# KT-Trygdarpolitikkur fyri Vága kommmunu

Samtykt á býráðsfundi tann 29. februar 2016.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

## KT- Trygdarpolitikkur fyri Vága kommunu

### 1. Endamál

Vága Kommuna setur við hesum KT-trygdarpolitikki mál og krøv til KT-trygdina í kommuni.

Hesi mál og krøv eru sostatt grundarlagið undir allari víðari greining av trygdini.

Trygdarpolitikkurin er galdandi fyri øll, sum starvast hjá Vága kommunu. Somuleiðis eru málini og krøvini í hesum politikki galdandi fyri øll, sum hava atgongd til skipanina hjá Vága kommunu, herundir allir veitarar.

KT trygdarpolitikkurin skal leggjast fyri býráðið fyrst í hvørjum valskeiði. Um týðandi broytingar eru í váðametingini ella lóggávuni, skal politikkurin endurskoðast.

Eins og hesin KT-trygdarpolitikkur byggir á eina váðagreining, skulu øll trygdartiltøk í Vága kommunu byggja á váðagreiningar.

### 2. Allýsing av upplýsingatrygd

Upplýsingatrygd merkir, at upplýsingarnar verða viðgjørdar í trúnaði, eru heilskaptar og tøkar:

**Trúnaður:** Trygd fyri, at upplýsingarnar ikki koma óviðkomandi í hendi.

**Heilskapt:** Trygd fyri, at upplýsingarnar eru neyvar og fullfíggjaðar.

**Tøkar:** Trygd fyri, at upplýsingarnar eru tøkar fyri rætta viðkomandi.

### 3. Mál fyri trygdina

Endamáli við at hava trygdarpolitikk er, at trygdin skal vera á so høgum støði, at borgarin til eina og hvørja tí kann verða tryggur við upplýsingar, sum kommunan hevur í varðveitslu.
Eingi undantøk skulu gerast, sum kunnu seta trygdina í váða.

### 4. Stevnumið

Langtíðarætlanin fyri at røkka trygdarmálunum umfatar hesi tiltøk:

At tilevna vegleiðingar og mannagongdir fyri einstøku deildina og einstaka starvsfólkið.

At tilevna metingar um møguligar vandar, og greina møguligar avleiðingar.

At breiða út vitan og áskoðanir til starvsfólkið, sum sannførir tey um, at trygdartiltøkini eru tiltøk, sum øll hava ábyrgdina av, og sum øll mugu viðvirka til at varðveita.

Eftirlit og grannskoðan.

## 5. Ábyrgd

### Bygdaráðið

Býráðið hevur ábyrgd av, og skal taka støðu til KT-trygdina og -nýtsluna hjá Vága kommunu. Í grundarlagnum undir støðutakanini skal vera ein meting av teimum váðum, sum KT-virksemið
hjá Vága kommunu viðførir.

### Borgarstjórin

Innan karmarnar av hesum yvirskipaða KT-trygdarpolitikki og lóggávu hevur borgarstjórin ábyrgd av KT-trygdini í Vága kommunu.

Borgarstjórin hevur ábyrgd av, at krøv til trygdina í Vága kommunu verða gjørd, og at tilnevna tey, sum fáa ábyrgdina av, at krøvini verða framd í verki.

Krøvini skulu vera sjónlig og klár at nýta, og skulu geva greitt yvirlit yvir, hvør hevur ábyrgdina av teimum ymsu økjunum og av, hvussu hetta verður gjørt.

Í sambandi við álvarsligar trygdarhendingar, skal borgarstjórin boða býráðnum frá. Hevur trygdarhendingin nakað at gera við upplýsingar hjá borgarum, skulu hesir eisini hava fráboðan. Dátueftirlitið skal altíð fráboðast um trúðnaður við persónsupplýsingum er brotin.

Trygdararbeiðsgongdir skulu gerast, har ongar eru frammanundan.

Starvsfólk skulu kunnast um galdandi trygdarreglur árliga.

Ábyrgdarhavarin skal syrgja fyri, at tað einstaka starvsfólkið fær møguleika at seta seg inn í KT-trygdarpolitikkin,
við tilhoyrandi trygdarásetingum og mannagongdum.

Nýtsluskipanir skulu gerast í samsvar við trygdarkrøvini.

Ábyrgdarhavarin syrgir fyri, at teldur, farteldur, teldlar og fartelefonir og geymar eru krypteraðar og at loyniorð (passorð) verður nýtt.

Í hvørjum einstøkum førið gevur borgarstjórin loyvi til heimaarbeiðapláss til ávísar tíðarásettar uppgávur. Serlig atlit og trygdarkrøv skulu setast um, hvussu og hvat arbeiðast kann við.

Viðkvæmar upplýsingar, hava serlig strong kt-trygdarkrøv

## Starvsfólk

Tað áliggur starvsfólkunum at kenna galdandi trygdarfyriskipanir, at fylgja teimum, og at boða borgarstjóranum frá,
um tey varnast veikleikar ella brot.

Hevur starvsfólk av einari ella aðrari orsøk mistanka um, at trygdin ikki er í lagi, skal viðkomandi starvsfólk venda sær til borgarstjóran sum skjótast.

Øll broyting í skipanini skal sporðast.

Broytingar til skipanirnar, skulu fara fram eftir eini broytingarmannagongd. Týðandi skipanir skulu logga broytingar av upplýsingum.

Øll starvsfólk hava sítt egna brúkaranavn og passorð, sum er strangt persónligt og álagt tagnarskyldu, og skal undir ongum umstøðum upplýsast nøkrum øðrum.

Skulu onnur, eitt nú veitarar inn (netfólk) inn á teldu hjá brúkara, skal viðkomandi hava undirskrivað tagnarskyldu mótvegis Vága kommunu ella hjá sínum arbeiðsgevara. Er neyðugt at nýta brúkara atgongd hjá starvsfólki, skal starvsfólki logga inn sjálvur og ansa eftir, hvat verður gjørt..

## Starvsfólk - Starvssetan / úr starvi

Øll starvsfólk, ið verða sett í starv í Vága kommunu, skulu undirskriva eina váttan um tagnarskyldu og
skulu beinanvegin fáa at vita, at tagnarskyldan eisini er galdandi, eftir at tey eru farin úr starvi.

Verða starvsfólk søgd úr starvi, skal atgongd teirra til telduskipanir og skjøl hjá Vága kommunu steðgast
beinanvegin.

## 6. Atferð

Tað er strangliga bannað at:

> Brúka upplýsingar og skipanir hjá Vága kommunu og borgarum uttan heimild ella brúka tær til onnur endamál enn til arbeiðið.
>
> Málbera seg ólógliga, tað veri seg ónærisliga, diskriminerandi ella fyri at plága onnur.

Taka niður og goyma ella senda ólógligt tilfar frá internetinum, t.d. við ónærisligum (porno) ella
diskriminerandi innihaldi ella har lisensur er ásettur, t.d. forrit, tónleik og filmir.

Flyta burtur upplýsingar ella útgerð frá Vága kommunu uttan heimild frá borgarstjóranum.

Brúka upplýsingar, hentleikar ella útgerð uttan heimild.

Avrita upplýsingar ella ritbúna uttan heimild.

Avdúka loyniorð/passorð (t.d. við at skriva niður ella siga øðrum).

Gagnnýta persónsupplýsingar til handilsligt endamál.

Umrøða Kt-trygdarviðurskifti hjá Vága kommunu á almennum støðum.

Broyta ella á annan hátt ávirka próvgrundarlagið í samband við kanning av hending.

Allir brúkarar skulu:

Læsa viðkvæmar miðlar og dokumentatión inni, tá hesi ikki verða brúkt.

Logga av skipanum, tá farið verður frá arbeiðsstøðum.

Um starvsfelagið fær kunnleika um, at onnur kenna loyniorð, skal viðkomandi tryggja, at loyniorðið verður broytt. Um ikki, skal skrivarin/borgarstjórin kunnast.

## 7. Brot á trygdarpolitikkin

Brot á trygdarpolitikkin við tilhoyrandi trygdarfyriskipanum og trygdarmannagongdum kann viðføra álvarsligar fylgir og tap fyri Vága kommunu og borgaran . Tí kann eitt tilætlað brot ella brot gjørt við grovum ósketni viðføra munnliga ella skrivliga átalu og, um brotið var álvarsligt, kann talan verða um uppsøgn ella burturvísing.

## 8. Uttanhýsis viðurskifti

### Ábyrgdarbýtið

Fyri at tryggja, at báðir partar vita, hvat hvør hevur ábyrgd av, skal tað vera skjalfest, hvussu ábyrgdar- og heimildarbýti er.

### Samstarv við triðjapart

Verður arbeiðið útveitt (outsourcað) til triðjapart, skal trygdarstøðið skrivliga avtalast.

Trygdarstøðið skal vera á hædd við trygdarstøðið í kommununi. Í avtaluni skal eisini standa, hvussu Vága kommuna kann tryggja sær, at trygdarstøðið er tað, ið er avtalað.

Upphavs- og ognarrætturin skal fastleggjast í avtaluni.

Øll, sum kunna fáa atgongd til skipanina uttanhýsis, og sum kunnu væntast at koma í samband við trúnaðarupplýsingar, skulu undirskrivað eina tagnarskyldu.

### Upplýsingar til triðjapart

Upplýsingar kunnu bert latast triðja parti, um eigarin av upplýsingunum skrivliga hevur váttað tað.

Tryggjast skal, at upplýsingar ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi.

## 9. Verkseting

Verkseting av nýggjum skipanum, og broyting av verandi skipanum, skal fylgja einum føstum leisti, sum í minsta lagi umfatar krav um endurskoðan, góðkenning, skjalfesting og "fall-back" ætlan.

## 10. Skipanir

### Ábyrgdarpersónar

Ábyrgdarpersónar skulu vera útnevndir fyri øll týðandi virkisøki.

### Skjalfesting

Neyðugt skjalfesting skal finnast av øllum tilfeingi (tól- og ritbúnaði).

Skjalfestingin av skipanunum skal vera dagførd og skal, um neyðugt, útbyggjast í samband við menning, broytingar og nýggj krøv.

### Trygd í skipanum

### Vága kommuna skal undirskrivað trygdaravtalu, har sporføri til eina og hvørja tíð kann førast í samband við handlingar

Møguleikin hjá einstakum persónum at víkja uttanum trygdarfyriskipanirnar hjá Vága kommunu skulu avmarkast mest møguligt. Hetta verður m.a. gjørt við at avmarka rættin hjá einstaklingum at

fremja broytingar í skipanini.

Tryggjast skal, at upplýsingar ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi. Herímillum at skipanin sjálv loggar av, um hon ikki verður nýtt.

Avrit skal í neyðugan mun takast av skipanum og upplýsingum soleiðis, at váðin fyri at forrit ella upplýsingar hvørva, er komið niður á eitt kent og góðtikið støði.

Skjótt og munadygt skal boðast borgarstjóranum/skrivaranum frá hendingum, ið kunnu ávirka trygdina.

## Trygdarhendingar og feilviðgerð

Trygdarhendingar og feilviðgerð skulu festast á skjal og fráboðast borgarstjóranum. Sambært lóg skal Dátueftirlitið fráboðast um trúnaðarupplýsingar koma óviðkomandi í hendi.

## 13. Tilbúgving

Fyri at ein skaði á KT-skipanina í Vága kommunu ikki skal fáa álvarsligar avleiðingar fyri kommununa og borgarar tess, skal ein tilbúgvingarætlan finnast.

Endamálið við tilbúgvingarætlanini er at fáa skipanirnar virknar aftur aftaná ein skaða, og skulu tær venda aftur til vanligan rakstur, áðrenn eitt frammanundan avtalað tíðarbil er umliðið.

Tryggjast skal, at allar skipanir og upplýsingar eru tøkar aftur innan ávísar tíðarkarmar, og at tær mest týðandi skipanirnar eru tøkar aftur innan 72 tímar.

Tilbúgvingarætlanin skal roynast javnan, soleiðis at starvsfólk læra at brúka hana, og soleiðis at møguligir veikleikar í ætlanini verða avdúkaðir og rættaðir.

Tilbúgvingarætlanin skal gjøgnumgangast einaferð um árið. Harumframt skal tilbúgvingarætlanin tillagast týðandi broytingum í umhvørvinum.

## 14. Undantøk

Bert borgarstjórin kann í serligum førum gera skrivlig tíðaravmarkað undantøk frá hesum Politikki, og skal hann tá á fyrstkomandi býráðsfundi greiða frá avgerðini.

Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann 29. februar 2016.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari

VÁGA KOMMUNA

# KT-Trygdarpolitikkur fyri Vága kommmunu

Samtykt á býráðsfundi tann 29. februar 2016.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

## KT- Trygdarpolitikkur fyri Vága kommunu

### 1. Endamál

Vága Kommuna setur við hesum KT-trygdarpolitikki mál og krøv til KT-trygdina í kommuni.

Hesi mál og krøv eru sostatt grundarlagið undir allari víðari greining av trygdini.

Trygdarpolitikkurin er galdandi fyri øll, sum starvast hjá Vága kommunu. Somuleiðis eru málini og krøvini í hesum politikki galdandi fyri øll, sum hava atgongd til skipanina hjá Vága kommunu, herundir allir veitarar.

KT trygdarpolitikkurin skal leggjast fyri býráðið fyrst í hvørjum valskeiði. Um týðandi broytingar eru í váðametingini ella lóggávuni, skal politikkurin endurskoðast.

Eins og hesin KT-trygdarpolitikkur byggir á eina váðagreining, skulu øll trygdartiltøk í Vága kommunu byggja á váðagreiningar.

### 2. Allýsing av upplýsingatrygd

Upplýsingatrygd merkir, at upplýsingarnar verða viðgjørdar í trúnaði, eru heilskaptar og tøkar:

**Trúnaður:** Trygd fyri, at upplýsingarnar ikki koma óviðkomandi í hendi.

**Heilskapt:** Trygd fyri, at upplýsingarnar eru neyvar og fullfíggjaðar.

**Tøkar:** Trygd fyri, at upplýsingarnar eru tøkar fyri rætta viðkomandi.

### 3. Mál fyri trygdina

Endamáli við at hava trygdarpolitikk er, at trygdin skal vera á so høgum støði, at borgarin til eina og hvørja tí kann verða tryggur við upplýsingar, sum kommunan hevur í varðveitslu.
Eingi undantøk skulu gerast, sum kunnu seta trygdina í váða.

### 4. Stevnumið

Langtíðarætlanin fyri at røkka trygdarmálunum umfatar hesi tiltøk:

At tilevna vegleiðingar og mannagongdir fyri einstøku deildina og einstaka starvsfólkið.

At tilevna metingar um møguligar vandar, og greina møguligar avleiðingar.

At breiða út vitan og áskoðanir til starvsfólkið, sum sannførir tey um, at trygdartiltøkini eru tiltøk, sum øll hava ábyrgdina av, og sum øll mugu viðvirka til at varðveita.

Eftirlit og grannskoðan.

## 5. Ábyrgd

### Bygdaráðið

Býráðið hevur ábyrgd av, og skal taka støðu til KT-trygdina og -nýtsluna hjá Vága kommunu. Í grundarlagnum undir støðutakanini skal vera ein meting av teimum váðum, sum KT-virksemið hjá Vága kommunu viðførir.

### Borgarstjórin

Innan karmarnar av hesum yvirskipaða KT-trygdarpolitikki og lóggávu hevur borgarstjórin ábyrgd av KT-trygdini í Vága kommunu.

Borgarstjórin hevur ábyrgd av, at krøv til trygdina í Vága kommunu verða gjørd, og at tilnevna tey, sum fáa ábyrgdina av, at krøvini verða framd í verki.

Krøvini skulu vera sjónlig og klár at nýta, og skulu geva greitt yvirlit yvir, hvør hevur ábyrgdina av teimum ymsu økjunum og av, hvussu hetta verður gjørt.

Í sambandi við álvarsligar trygdarhendingar, skal borgarstjórin boða býráðnum frá. Hevur trygdarhendingin nakað at gera við upplýsingar hjá borgarum, skulu hesir eisini hava fráboðan. Dátueftirlitið skal altíð fráboðast um trúðnaður við persónsupplýsingum er brotin.

Trygdararbeiðsgongdir skulu gerast, har ongar eru frammanundan.

Starvsfólk skulu kunnast um galdandi trygdarreglur árliga.

Ábyrgdarhavarin skal syrgja fyri, at tað einstaka starvsfólkið fær møguleika at seta seg inn í KT-trygdarpolitikkin, við tilhoyrandi trygdarásetingum og mannagongdum.

Nýtsluskipanir skulu gerast í samsvar við trygdarkrøvini.

Ábyrgdarhavarin syrgir fyri, at teldur, farteldur, teldlar og fartelefonir og geymar eru krypteraðar og at loyniorð (passorð) verður nýtt.

Í hvørjum einstøkum førið gevur borgarstjórin loyvi til heimaarbeiðapláss til ávísar tíðarásettar uppgávur. Serlig atlit og trygdarkrøv skulu setast um, hvussu og hvat arbeiðast kann við.

## Starvsfólk

Tað áliggur starvsfólkunum at kenna galdandi trygdarfyriskipanir, at fylgja teimum, og at boða borgarstjóranum frá,
um tey varnast veikleikar ella brot.

Hevur starvsfólk av einari ella aðrari orsøk mistanka um, at trygdin ikki er í lagi, skal viðkomandi starvsfólk venda sær til borgarstjóran sum skjótast.

Øll broyting í skipanini skal sporðast.

Broytingar til skipanirnar, skulu fara fram eftir eini broytingarmannagongd. Týðandi skipanir skulu logga broytingar av upplýsingum.

Øll starvsfólk hava sítt egna brúkaranavn og passorð, sum er strangt persónligt og álagt tagnarskyldu, og skal undir ongum umstøðum upplýsast nøkrum øðrum.

Skulu onnur, eitt nú veitarar inn (netfólk) inn á teldu hjá brúkara, skal viðkomandi hava undirskrivað tagnarskyldu mótvegis Vága kommunu ella hjá sínum arbeiðsgevara. Er neyðugt at nýta brúkara atgongd hjá starvsfólki, skal starvsfólki logga inn sjálvur og ansa eftir, hvat verður gjørt..

## Starvsfólk - Starvssetan / úr starvi

Øll starvsfólk, ið verða sett í starv í Vága kommunu, skulu undirskriva eina váttan um tagnarskyldu og
skulu beinanvegin fáa at vita, at tagnarskyldan eisini er galdandi, eftir at tey eru farin úr starvi.

Verða starvsfólk søgd úr starvi, skal atgongd teirra til telduskipanir og skjøl hjá Vága kommunu steðgast
beinanvegin.

## 6. Atferð

Tað er strangliga bannað at:

> Brúka upplýsingar og skipanir hjá Vága kommunu og borgarum uttan heimild ella brúka tær til onnur endamál enn til arbeiðið.
>
> Málbera seg ólógliga, tað veri seg ónærisliga, diskriminerandi ella fyri at pága onnur.

Taka niður og goyma ella senda ólógligt tilfar frá internetinum, t.d. við ónærisligum (porno) ella
diskriminerandi innihaldi ella har lisensur er ásettur, t.d. forrit, tónleik og filmir.

Flyta burtur upplýsingar ella útgerð frá Vága kommunu uttan heimild frá borgarstjóranum.

Brúka upplýsingar, hentleikar ella útgerð uttan heimild.

Avrita upplýsingar ella ritbúna uttan heimild.

Avdúka loyniorð/passorð (t.d. við at skriva niður ella siga øðrum).

Gagnnýta persónsupplýsingar til handilsligt endamál.

Umrøða Kt-trygdarviðurskifti hjá Vága kommunu á almennum støðum.

Broyta ella á annan hátt ávirka prógrundarlagið í samband við kanning av hending.

Allir brúkarar skulu:

Læsa viðkvæmar miðlar og dokumentatión inni, tá hesi ikki verða brúkt.

Logga av skipanum, tá farið verður frá arbeiðsstøðum.

Um starvsfelagið fær kunnleika um, at onnur kenna loyniorð, skal viðkomandi tryggja, at loyniorðið verður broytt. Um ikki, skal skrivarin/borgarstjórin kunnast.

## 7. Brot á trygdarpolitikkin

Brot á trygdarpolitikkin við tilhoyrandi trygdarfyriskipanum og trygdarmannagongdum kann viðføra álvarsligar fylgir og tap fyri Vága kommunu og borgaran . Tí kann eitt tilætlað brot ella brot gjørt við grovum ósketni viðføra munnliga ella skrivliga átalu og, um brotið var álvarsligt, kann talan verða um uppsøgn ella burturvísing.

## 8. Uttanhýsis viðurskifti

### Ábyrgdarbýtið

Fyri at tryggja, at báðir partar vita, hvat hvør hevur ábyrgd av, skal tað vera skjalfest, hvussu ábyrgdar- og heimildarbýti er.

### Samstarv við triðjapart

Verður arbeiðið útveitt (outsourcað) til triðjapart, skal trygdarstøðið skrivliga avtalast.

Trygdarstøðið skal vera á hædd við trygdarstøðið í kommununi. Í avtaluni skal eisini standa, hvussu Vága kommuna  kann tryggja sær, at trygdarstøðið er tað, ið er avtalað.

Upphavs- og ognarrætturin skal fastleggjast í avtaluni.

Øll, sum kunna fáa atgongd til skipanina uttanhýsis, og sum kunnu væntast at koma í samband við trúnaðarupplýsingar, skulu undirskrivað eina tagnarskyldu.

### Upplýsingar til triðjapart

Upplýsingar kunnu bert latast triðja parti, um eigarin av upplýsingunum skrivliga hevur váttað tað.

Tryggjast skal, at upplýsingar ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi.

## 9. Verkseting

Verkseting av nýggjum skipanum, og broyting av verandi skipanum, skal fylgja einum føstum leisti, sum í minsta lagi umfatar krav um endurskoðan, góðkenning, skjalfesting og "fall-back" ætlan.

## 10. Skipanir

### Ábyrgdarpersónar

Ábyrgdarpersónar skulu vera útnevndir fyri øll týðandi virkisøki.

### Skjalfesting

Neyðugt skjalfesting skal finnast av øllum tilfeingi (tól- og ritbúnaði).

Skjalfestingin av skipanunum skal vera dagførd og skal, um neyðugt, útbyggjast í samband við menning, broytingar og nýggj krøv.

### Trygd í skipanum

### Vága  kommuna skal undirskrivað trygdaravtalu, har sporføri til eina og hvørja tíð kann førast í samband við handlingar

Møguleikin hjá einstakum persónum at víkja uttanum  trygdarfyriskipanirnar hjá Vága kommunu skulu avmarkast mest møguligt. Hetta verður m.a. gjørt við at avmarka rættin hjá einstaklingum at

fremja broytingar í skipanini.

Tryggjast skal, at upplýsingar ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi. Herímillum at skipanin sjálv loggar av, um hon ikki verður nýtt.

Avrit skal í neyðugan mun takast av skipanum og upplýsingum soleiðis, at váðin fyri at forrit ella upplýsingar hvørva, er komið niður á eitt kent og góðtikið støði.

Skjótt og munadygt skal boðast borgarstjóranum/skrivaranum frá hendingum, ið kunnu ávirka trygdina.

### Trygdarhendingar og feilviðgerð

Trygdarhendingar og feilviðgerð skulu festast á skjal og fráboðast borgarstjóranum. Sambært lóg skal Dátueftirlitið fráboðast um trúnaðarupplýsingar koma óviðkomandi í hendi.

### 13. Tilbúgving

Fyri at ein skaði á KT-skipanina í Vága kommunu ikki skal fáa álvarsligar avleiðingar fyri kommununa og borgarar tess, skal ein tilbúgvingarætlan finnast.

Endamálið við tilbúgvingarætlanini er at fáa skipanirnar virknar aftur aftaná ein skaða, og skulu tær venda aftur til vanligan rakstur, áðrenn eitt frammanundan avtalað tíðarbil er umliðið.

Tryggjast skal, at allar skipanir og upplýsingar eru tøkar aftur innan ávísar tíðarkarmar, og at tær mest týðandi skipanirnar eru tøkar aftur innan 72 tímar.

Tilbúgvingarætlanin skal roynast javnan, soleiðis at starvsfólk læra at brúka hana, og soleiðis at møguligir veikleikar í ætlanini verða avdúkaðir og rættaðir.

Tilbúgvingarætlanin skal gjøgnumgangast einaferð um árið. Harumframt skal tilbúgvingarætlanin tillagast týðandi broytingum í umhvørvinum.

### 14. Undantøk

Bert borgarstjórin kann í serligum førum gera skrivlig tíðaravmarkað undantøk frá hesum Politikki, og skal hann tá á fyrstkomandi býráðsfundi greiða frá avgerðini.

Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann 29. februar 2016.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari